SUNDA KOMMUNA

## Lærarastarv við Hvalvíkar skúla

Søkt verður eftir lærara til Hvalvíkar skúla frá **1. oktober 2007 – 28. juni 2008.**

**Lærugreinir:**
- Føroyskt í 3. flokki
- Heimstaðarlæra í 3. flokki
- Kristni í 3. flokki
- Rokning í 1. og 2. flokki
- Heimstaðarlæra í 1. og 2. flokki

**Søkt verður eftir lærara, sum:**
- Undir ábyrgd leiðslunnar og í samstarvi við lærarar skúlans, skal undirvísa og taka lut í dagliga arbeiði skúlans
- Dugir at samstarva og er fyrikomandi
- Er fúsur at taka á seg uppgávur og avbjóðingar, ið eru á skúlanum
- Vil vera við til framhaldandi at menna skúlan

**Førleikakrøv:**
Tann, ið settur verður, skal hava læraraútbúgving. Um eingin við útbúgving søkir, verður annað fólk sett í staðin.

**Lønar- og setanartreytir:**
Starvið er parttíðarstarv, 20 tímar um vikuna, og verður lønt í lønarflokkunum 18.1 – 27.4 sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Lærarafelag.

**Umsóknir:**
Umsóknir saman við avriti av prógvi og møguligum viðmælum skulu verða skúlanum í hendi í seinasta lagi **mánadagin 17. september, kl. 12.00.**

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Aslaug Olsen, skúlaleiðara, á telefon 422028 – 607551 ella 222475.

**Umsóknir vera sendar til:**
**Hvalvíkar skúla**
Skúlavegur 1
430 Hvalvík

*Hvalvíkar skúli hevur komandi ár uml. 45 næmingar og 6 lærarar. Skúlin er ein 3-flokkaður skúli við næmingum í aldrinum 1.-7. flokk.*

Runavíkar kommuna

## Kunngerð
## Um broyting av Býarplaninum fyri Runavíkar Kommunu

Við heimild í løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954, seinast broytt 13. mai 1997, verður við hesum boðað frá, at Býráðið á fundi 31/05- 2007 hevur samtykt at gera broytingar í býarplaninum sunnan fyri Skála skúla og vestan fyri Sambýlið á Skála.

**Skála**
Broytingin á Skála umfatar nýtt B-øki á C4-øki og E1-øki vestan fyri Sambýlið, og umfatar broytingin hesar matriklar: 34a, 42a, 62a, 75a, 76a, 77a, 80, 82, 85a, 86, 87a, 91a, 92a, 94, 116a, 117a, 120a, 121a, 123a, 125a, 126a, 128a, 132a, 133a, 135a, 141a, 144, 148, 300a, 315a, 335, 336, 337a, 341, 342, 343, 399, 401, 402, 403, 404, 425, 544a, 545 og 621.

Broytingarnar eru til skjals í svørtutalvu á Skála og á býráðsskrivstovuni í Saltangará, í upplatingartíðunum frá 12. september til og við 3. oktober 2007.

Møgulig mótmælir og/ella broytingaruppskot skulu vera býráðnum í hendi í seinasta lagi **12. desember 2007.**

Saltangará, tann 9. sept. 2007
**Runavíkar býráð**



temp-team
VAL AV STARVSFÓLKI & VIKARUM

## Kom og skráset teg

Kundi tú hugsað tær at arbeitt sum vikarur? Ella komið í eitt fast starv?

Vilt tú verða fleksibul og ráða yvir tíðini sjálv/ur?

Vit hava eisini brúk fyri pensionistum og lesandi.

Vit røkka um alt landið.

TEMP-TEAM er eitt vikarbureau.

TEMP-TEAM Føroyar er ein partur av fleiri deildum runt um í Europa og úti í heimi.

Okkara uppgáva er at finna starvsfólk, ið kunnu arbeiða sum vikarar og tey sum vilja koma í eitt fast starv, bæði á sjógvi og landi.

Far inn á heimasíðu okkara **www.temp-team.fo**
TEMP-TEAM, Niels Finsensgøta 37, FO-100 Tórshavn **Tel.: +298 61 61 00**

## Neyst til sølu

Um hóskandi boð fæst, er stórt neyst Millum Bóla í Kollafirði til sølu. Pláss er fyri stórum báti, tá neystið er 11 metrar langt og 5 metrar breitt. Fríhæddin er knappar 4 metrar.

Neystið er nýtt, men ikki heilt liðugt. Perfekt til tann, sum vil innrætta eftir egnum ynski. Loftið er 55 m².

Aðrir fyrimunir eru, at tað er so tætt við Havnina, nærum eingin munur á flóð og fjøru. So veðurgott at altíð slepst at við báti, og tað slepst til neystið við bili.

**Ring 315043,** eftir kl. 18.00
**Frímund Hansen**

NIELS L. ARGE
HANDMADE JEWELLERY
ESTABLISHED 1932
**Kongabrúgvin • 100 Tórshavn • Tel. 311731 • Fax 318532**

Søkt verður eftir krambakvinnu yvir 18 ár at byrja beinanvegin at arbeiða í handli okkara.

Starvið er fulla tíð fram til 31. desember 2007.

Nærri fæst at vita um stavið við at ringja tlf. 219418.

Skrivlig umsókn verður at senda til:
**SP/f Niels L. Arge**
Postsmoga 169
110 Tórshavn

## Hús til leigu

Sethús í vesturbýnum í Havn til leigu til fólk, sum fara væl um. Víddin er 90 fermetrar, umframt stóran kjallara og hjall (uml. 40 fermetrar).
Stutt er til skúla, buss og barnagarð.

Mánaðarlig leiga er 7.500 kr. + ljós og hita.
(1 mðr. depositum krevst).

***Bill.mrk. 3541***

## Søkt verður eftir leiðara til barnagarðin "Leikan" í Skálavík

Í barnagarðinum, ið er normeraður til 15 børn eru bæði vøggustovu- og barnagarðsbørn og eisini skúlabørn í frítíðar ansingini. Í løtuni eru 7 børn á stovninum.

Áhugaðir umsøkjarar, ið hava fyrispurningar eru vælkomnir at seta seg í samband við kommununa, tlf. 361031 ella 21 92 21.

Skrivlig umsókn við møguligum prógvum og viðmælum verður at senda til Skálavíkar kommunu, Gerðisvegur 13 Fo-220 Skálavík, og skal verða okkum í hendi seinast **mánadagin 1. oktober 2007.**

Lønar og setanartreytir sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala arbeiðsgevarafelagið.

**Skálavíkar Kommuna**
Gerðisvegur 13 • Fo-220 Skálavík • Tlf: 361221 • Fax: 361909
E-mail: skv@post.olivant.fo

## Opel Omega til sølu

Opel Omega 2.5 TD auto.

Í góðum standi til sølu.
Hevur nýggjan gearkassa og forlyktur.

**Tel. 57 36 60 ella 37 36 60**

## Lastbilførari við kranaloyvi søkist

Vinarliga ring 217946
Sp/f Álvur Ziska